Truckerfestivalurin 2004:

# Stórfingin framsýning av stórum bilum í Runavík

**Annað árið á rað varð skipað fyri Truckerfestivali á kaiøkinum í Runavík leygardagin 28. august. Tiltakið var fyri fyrstu ferð roynt í 2003. Leif Eliasen í Klaksvík er stigtakari til festivalin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Tá Truckerfestivalurin læt upp leygardagin 28. august 2004, høvdu 56 stórir bilar teknað seg til. Sum nakað nýtt vóru eisini kampingvognar við á festivalinum.

Áhugin var stórur fyri tiltakinum, og dúgliga varð prátað millum bilarnar.

Atgongdin til festivalin var ókeypis, men tey vitjandi fingu ein atkvøðuseðil, soleiðis at tey kundu atkvøða um vakrasta bilin í hvørjum bólki.

Fimm steyp vórðu latin til vakrastu bilarnar, og bilarnir vórðu býttur í fimm bólkar og nr. eitt í hvørjum bólki fekk steyp.

Leygarkvøldið handaði Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu, steypini til bilførararnar á bilunum, sum høvdu vunnið. Føroya Shell læt tey fimm steypini.

Í bólki 1, trekkjarar (forvognar), vann ein Volvo FH12 hjá Skipafelagnum Føroyar, í bólki 2, lastbilar, vann ein Volvo FH12 hjá Hans Egil Joensen á Eiði, í bólki 3, kranabilar, vann ein MAN hjá Marna Berg í Søldarfirði, í bólki 4, bussar, vann ein Volvo hjá Askham Bussum í Hvannasundi, í bólki 5, trailarar, vann eisini ein Volvo FH12 hjá Hans Egil Joensen á Eiði.

Umframt steypini fingu vinnararnir eisini Helix smyrjuolju, krúss og taskur frá Shell, ein kassa av Jolly frá Føroya Bjór, slipsnálir, pennar og nálir frá Runavíkar kommunu

Tá festivalurin endaði sunnudagin um fimm tíðina, koyrdu bilarnir í konvoy til Norðragøtu at venda, har festivalurin fekk sín enda.

Stigtakarin til Truckerfestivalin, Leif Elisasen í Klaksvík, er væl nøgdur við tiltakið, og hann er longu byrjaður at leggja festivalin í 2005 til rættis.



*Leif Eliasen var stigtakari og samskipari av Truckerfestivalinum í Runavík*











## Broyttar mannagongdir

Torbjørn Jacobsen fer mikudagin at spyrja løgmann, Jóannes Eidesgaard, hvussu tað ber til, at mannagongdirnar viðvíkjandi landsstýrisfundum eru broyttar.

Løgtingsmaðurin vísir á, at sambært heimasíðuni hjá Landsstýrinum, er mannagongdin fyri landsstýrisfundir broytt nakað, síðani Jóannes Eidesgaard loysti Anfinn Kallsberg av.

Torbjørn Jacobsen vísir á, at tað er týðandi at fáa at vita, hvør orsøkin er til broytingar í umsitingarligum mannagongdum, og spyr samstundis hvørt løgmaður heldur, at broytingarnar eru í samsvar við stýrisskipanarlógina.

Tí spyr tingmaðurin, hvør orsøkin er til, at løgmaður hevur broytt mannagongdina fyri, hvørji mál skula viðgerast á politiskum landsstýrisfundi. Og serliga hugsar tingmaðurin um ásetingina hjá løgmanni um, at tá ið einstøk fiskiloyvir skula latast eiga hesi mál at verða løgd fyri politiskan landsstýrisfund.

**-jm**

Einastandandi tilboð




Alt er nú aftur á goymslu
Fyri deilin einans kr. 10,-
Uppi á Hálsi
Tel 35 46 80

TOYOTA AVENSIS TIL SØLU



LINEA SOL FRÁ DESEMBER 2001
· 1,8 l BENSINMOTOR
· 135 HK.
· KOYRT 42.000 KM.

ERVÆL ÚTGJØRDUR, OG HEVUR M.A.:
· AIR-CONDITION
· TRÆPANELIR
· EL-DRIVNAR RÚTAR
· TOKULYKTIR OG SPORTSFELGUR.
· PÍKADEKK Á FELGUM FYLGJA VIÐ.

PRÍSUPPSKOT: 165.000 KR.

- TEL 223336 / 341823 -